

# Leys størv

## Hjálparfólk til Dagstovnin í Øksnagerði

Søkt verður eftir einum hjálparfólki til vøggustovu at arbeiða 25 tímar um vikuna at byrja 18. september 2006 ella eftir nærri avtalu.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Umsóknarfreist: Mánadagin 21. august 2006.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jesper Roos stovnsleiðara tlf.: 31 99 59

## Køkshjálp og reingerðarfólk til Dagstovnin á Hamrinum

Søkt verður eftir einari køkshjálp at arbeiða 15 tímar um vikuna at byrja skjótast tilber, og eftir einum reingerðarfólki at arbeiða 3 tímar um dagin at byrja 1. september 2006.

Setanarviðurskifti: Størvini verða sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknarfreist: Fríggjadagin 25. august 2006.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Elisabeth Henriksen, stovnsleiðara, tlf.: 32 20 03 / 22 57 84

## Pedagogur til Stella Maris vøggustovu

Søkt verður eftir einum pedagogi at arbeiða 40 tímar um vikuna at byrja 1. september 2006 ella eftir nærri avtalu.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Umsóknarfreist: Leygardagin 26. august 2006.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Kristinu Eldevig, tlf.: 31 28 53 / 21 28 53

## Starvsfólk til teknisku deild

Søkt verður eftir starvsfólki at byrja skjótast tilber.

Setunarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknarfreist: Mánadagin 28. august 2006.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Boða Haraldson, býarverkfrøðing ella Janus Isfeldt, leiðara á starvsfólkadeildini, tlf.: 30 20 10

## Pedagogar til Frítíðarskúlan í Hornabø

Søkt verður eftir trimum pedagogum at arbeiða ávíkavist 20, 25 og 30 tímar um vikuna at byrja 1. september 2006 ella eftir nærri avtalu. Um pedagogur ikki verður settur í starv, verður hjálparfólk sett.

Setanarviðurskifti: Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Umsóknarfreist: Mánadagin 28. august 2006.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Ann Elisabeth Joensen, leiðara, tlf.: 21 44 67

**Les meira á www.torshavn.fo/leysstorv**

www.torshavn.fo er at síggja á Býarbókasavninum,
í Snarskivuni og í Kunningarstovuni

**Tórshavnar kommuna**

REPROZ

Klaksvíkar Kommuna / Snarskivan



# Leiðari til Snarskivuna

**Snarskivan**
**Klaksvíkar býráð hevur gjørt av at seta á stovn eina snarskivu. Snarskivan skal halda til í niðastu hædd í býráðshúsinum, sum ætlanin er at lata upp síðst í 2006.**

**Uppgávur hjá Snarskivuni:**
Snarskivan, sum umframt leiðaran verður mannað við trimum starvsfólkum, skal virka sum avgreiðsla hjá býráðsumsitingini.

Serkunnleikin hjá Snarskivuni verður innan kunning, samskifti og borgaratænastu.

**Í høvuðsheitum skal Snarskivan varða av:**
- Journalskipanini
- Fólkayvirlitinum
- Kunningarøkinum
- Ráð og vegleiðing
- Telefonmóttøka
- Avgreiðsla og postur
- Ymiskar uppgávur á tekniska økinum
- Ymiskar uppgávur á trivnaðarøkinum

**Høvuðsuppgávur leiðarans:**
- At hava leiðsluna og ábyrgdina av deildini
- At samskipa arbeiðið á deildini og við býráðsumsitingina annars
- Samskiftis- og kunningarøkið hjá kommununi

Sum tað fyrsta fær tann setti uppgávuna – í samstarvi við umsitingina annars – at skipa fyri og seta á stovn Snarskivuna og síðani at tryggja eitt støðugt høgt tænastustøðið og menna hana víðari.

**Førleikakrøv:**
- Duga at ganga á odda
- Duga at fyrisita og leiða
- Hava hollan kunnleika innan samskiftis- og kunningarøkið
- Hava náturligan myndugleika og eina nýmótans leiðslustíl
- Megna at røkja fl eiri sløg av krevjandi uppgávum innan kunningarøkið, samskifti og journalskipan.

**Útbúgving:**
- Viðkomandi hægri útbúgving innan samskifti

**Setanarviðurskifti:**
- Talan er um fulltíðarstarv.
- Lønar og setanarviðurskifti sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.
- Verður at tola bygnaðarbroytingar
- Starvið verður sett skjótast tilber
- Tilvísing til býráðsskrivaran

Meira fæst at vita við at venda sær til John Færø býráðsskrivara ella Jancy Biskopstø Klein sosialdeildarleiðara, tlf. 41 00 00. Víst verður eisini til starvsprofilin á www.klaksvik.fo

Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Klaksvíkar kommunu, í hendi í seinasta lagi mánadagin **tann 28. august 2006.**

***Klaksvíkar Kommuna***
***Postboks 2***
***700 Klaksvík***

**Stutt um Snarskivuna:**
Snarskivan er partur av menningarætlanini fyri kommununa. Hon er ein roynd at røkka longur og betur út til borgararnar í kommununi sum eitt væl- og skjóttvirkandi lið millum býráðsumsiting/býráð og borgara.

Hetta er í tráð við m.a. starvsfólkaligu visiónina um, at starvsfólkini *hjá Klaksvíkar Kommunu skulu veita borgarunum og vinnufyritøkum í kommunini so góðar tænstur sum gjørligt – dygdargott, forstáiliga, effektivt, skjótt, vinarliga og fyrikomandi.*

cre8 458006

Klaksvíkar Kommuna I Nólsoyar Pálsgøta 32 I FO-700 Klaksvík
Tel. 410000 I Fax. 410001 I klaksvik@klaksvik.fo I www.klaksvik.fo